Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
110 Tórshavn

Att. Niels W. Poulsen, adv

Tórshavn, tann 23-11-2023

**Viðv. mál nr.: 23/00407: Yvirtøkan hjá P/f 01.12.2015 av Sp/f Torgið**

Kappingareftirlitið fekk tann 30. oktober 2023 einfalda fráboðan, sbrt. § 2 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012. Fráboðað var at P/f 01.12.2015 ætlar at yvirtaka Sp/f Torgið frá Sp/f Torgið Holding. Fráboðanin var fullfíggjað tann 6. november 2023, sbrt. §17, stk. 5, 3. pkt. í kappingarlógini.

Talan er um eina yvirtøku eftir §13, stk. 1, nr. 2 tí ein fyritøka fær ræðið á aðrari fyritøku. Yvirtøkan skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí luttakandi fyritøkurnar høvdu samanlagt ein árliga umsetning í Føroyum, sum var 75 mió. kr. ella meir seinasta ár og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava 15 mió. kr. í umsetningi seinasta árið, sbrt. §14, stk. 1, nr. 1 í Kappingarlógini.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí ongin av luttakandi fyritøkunum virka á saman vøru- og landafrøðiliga marknað og ongin av luttakandi fyritøkum eru á einum ovara ella niðara marknað til ein marknað har onnur luttakandi fyritøka er virkin, sbrt. §3, stk. kunngerð nr. 20 frá 20. juli 2012.

P/f 01.12.2015 er felag sum P/f Poul Hansen eigur saman við Sp/f KSJ og er talan um felag undir felagsræðið. P/f 01.12.2015 eigur og rekur nakrar seks matvørurhandlar í Streymoy og Eysturoy. Sp/f Torgið er felag sum P/f Poul Hansen eigur einsamallur. Felagið rekur ein matvøruhandil í Vági.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í §15, stk. 5 í kappingarlógini tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna hjá P/f 01.12.2015 av Sp/f Torgið vísandi til §15, stk. 2 í kappingarlógini. Sambært ásetingini skal ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi